## Golf R32 við 241 hk



Tíðindi ganga um at ein VW Golf R32 við 241 hk er á veg. Bilurin skal avloysa Golf V6 4motion. Motorurin verður ein 3,2 litur VR6 við 6 gearum og trekkjur á øllum 4 hjólunum

*Kelda: bilpriser.dk*

## Nissan Murano



Nissan Murano verður sergjørdur til amerikanarar. Bilurin er ein crossover-bilur við 3.5 litur V6 motori við 240 hk. Murano hevur sportligar koyrieginleikar og trinleysan automatgearkassa við 7 gearum. Bilurin kemur ikki hendanvegin.

*Kelda: Bil Magasinet*

## Porsche Cayenne



Hjá Porsche hava teir funnið útav at tey flestu sum eiga ein Porsche hava eisini ein off-roadara. Nú, teir sjálvir hava gjørt off-roadaran Cayenne við 4.5 litur V8 motori og 450 hk og fýrahjólstrekk, vóna teir at báðir bilarnir verða av teirra merki

*Kelda: Bil Magasinet*

# Toyota Yaris – nú eisini sum diesel

**Yaris bilarnir, ið hava verið ein sonn succes hjá Toyota, koma nú við nýggjum dieselmotorum. Talan er um Yaris og Yaris Verso. 1.4 litur common-rail dieselmotorurin koyrir 23,3 km/l.**

BILAR
*Magnus Gunarsson*

Beinanvegin Toyota Yaris komu á marknaðin vórðu teir væl móttiknir og fingu heiðurslønir í hópatalið. Teir blivu t.d. ársins bilur í Evropa og vórðu heiðraðir fyri góðan kvalitet, trygd, góðar koyrieginleikar og øðrvísi og smart design. Nú eru teir so eisini komnir við nýggjum dieselmotori.

Hetta er ein 1.4 litur common-rail dieselmotorur við 75 hk. Motorurin er sera smidligur og trekkjur væl. Turboløðarin er innbygdur í útstoytsmanifoldið. Alu-motorurin vigar einans 99 kg við øllum.

Tað at nógv er gjørt burturúr at isolera væl millum motorrúmið og kabinuna, ger, at sera lítið hoyrist til motorin inni í bilinum. 1.4 D-4D motorurin á Yaris er sera orkusparandi, hann koyrir 23,3 km/l og toppferðin er 170 km/t.



*Hjá Reyni Service vænta teir sær nógv av Yaris 1.4 D-4D. Her er sølumaðurin, Ronny í Lon, við Yaris og Yaris Verso dieselbilunum*

### Toyota Yaris 1.4 D-4D

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.4 litur 4 syl. diesel 75 hk v.common-rail innsprænging |
| 0-100 km/t | 12,9 sek. |
| Oljunýtsla | 23,3 km/l (blandað koyring) |
| Støddir: | |
| Longd | 361,0 cm |
| Breidd | 166,0 cm |
| Hædd | 150,0 cm |
| Viðførisrúm | 205 litrar |
| Prísir | frá kr. 157.600,- |
| Søluumboð: | P/F Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www.reyniservice.fo |

# Reyni Service – mekaniska deildin á skúlabonk

**Mekaniski verkstaðurin hjá Reyni Service var stongdur frá 27. til 30. mai vegna skeiðvirksemi. Fólk frá teknisku deildini hjá Toyota Danmark vóru her og høvdu skeið um nýggjastu tøknina í Toyota bilunum.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Starvsfólkini á mekanisku deildini hjá Reyni Service sita her á skúlabonki, í hølum teir gjørdu til endamálið*

Tað er ikki tað sama at vera bilmekanikari nú á døgum, sum fyrr í tíðini. Um bilverkstøðini skulu hava møguleika fyri at gera allar tær neyðugu umvælingarnar, er neyðugt at mekanikararnir dagføra seg alla tíðina. Hetta verður gjørt við at fara á skeið uttanlanda ella at fólk koma hendanvegin at halda skeið. Tøkniliga menningin er so stór, at tað alla tíðina er okkurt nýtt at seta seg inn í.

Hjá Reyni Service hava teir á hvørjum ári stongt nakrar dagar vegna skeiðvirksemi. Í døgunum 27. til 30. mai vóru instruktørarnir, Kenny Bremerstent og Henrik Hansen, frá Toyota Danmark og hildu skeið fyri starvsfólkunum á mekanisku deildini hjá Reyni Service, har teir t.d. lærdu at brúka nýggja IT-testaran, um feilfinning og skeið í diesel-elektronikki.



*Instruktørarnir Kenny Bremerstent og Henrik Hansen frá Toyota Danmark undirvístu starvsfólkunum á mekanisku deildini um nýggjastu tøknina í Toyota bilunum*





